UTTAN ÚR HEIMI

# Fleiri børn doyðu í eldi

**Afrikanskir innflytarar í París búgva ofta á vánaligum húsum. Fyri aðru ferð í fýra mánaðir hevur eldur verið í einum av leiguhúsunum**

ELDSBRUNI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Gjáranáttina varð sløkkiliðið í París boðsent at koma til eitt av íbúðarhúsunum á horninum ímillum Boulevard Vincent og Rue Edmond-Flamand. Tá teir umleið hundrað sløkkiliðsmenninir høvdu fingið tamarhald á eldinum, høvdu 17 fólk latið lív, og 21 onnur vóru endað á sjúkrahúsi. Umleið helmingurin av teimum deyðu vóru børn.

- Fólk vóru ræðslusligin, og fleiri ætlaðu sær at leypa út ígjøgnum vindeyguni. Vit vóru heppin, men grannar okkara mistu børnini, segði ein av teimum bjargaðu kvinnunum við tíðindastovuna AFP.

Løgreglan í París sigur, at eldurin kyknaði á triðju hædd. Hann breiddi seg sera skjótt, so tá sløkkiliðið kom á staðið, var eldur í øllum teimum sjey hæddunum.

Fronsku fjølmiðlarnir søgdu í gjár, at húsini, sum brunnu, vóru bygd í 1920-árunum og í sera vánaligum standi. Sambært løgregluni búðu umleið 130 fólk í húsunum, og av teimum vóru næstan 100 børn. Øll vóru úr afrikonskum londum, tey flestu úr Mali og Senegal.

Fyri fýra mánaðum síðani var eldur í einum øðrum húsum í París, sum afrikanskir innflytarar búðu í. Ta ferðina doyðu 21 fólk, tey flestu vóru børn. Eisini tá skrivaðu franskir fjølmiðlar, at húsini vóru í sera vánaligum standi.



*Hendan gentan var heppin at sleppa út á lívi*

# Norski Arbeiðaraflokkurin stóra framgongd

**Nógv bendir á, at Jens Stoltenberg verður forsætisráðharri aftan á norska stórtingsvalið**

NOREG
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað gongur strúkandi hjá norska Arbeiðaraflokkinum í løtuni, og heldur gongdin fram, er lítið at ivast í, at Noreg fær eina reyð-grøna stjórn aftan á stórtingsvalið.

Tann seinasta veljarakanningin, sum varð almannakunngjørd í gjár, gav Arbeiðaraflokkinum 34,6 prosent av atkvøðunum, og so stóra undirtøku hevur flokkurin ikki havt í meiri enn fimm ár. Tað merkir eisini, at flokkurin hevur ongantíð havt so stóra undirtøku, síðani Jens Stoltenberg gjørdist formaður fyri trimum árum síðani.

Politiskir eygleiðarar siga, at nógv fólk, sum ikki vóru á vali seinast, ætla sær at atkvøða fyri Arbeiðaraflokkinum hesaferð, men kanningin vísir eisini, at flokkurin hevur tikið atkvøður frá samstarvsflokkinum Sosialistiska Vinstraflokkinum.

Jens Stoltenberg segði við Aftenposten í gjár, at flokkurin hevur fingið veljarar, tí hann hevur lagt stóran dent á at bøta um viðurskiftini hjá teimum gomlu og skúlaverkið, og tí hann ætlar at bøta um skattaskipanina. Kortini helt hann, at tað er ov tíðliga at fegnast enn, tí tað avgerandi er, hvat fólk siga sjálvan valdagin.

Harafturímóti hevur sitandi forsætisráðharrin, Kjell Magne Bondevik, lítið at fegnast um. Tann seinasta veljarakanningin gevur flokki hansara, Kristiliga Fólkaflokkinum, 6,9 prosent av atkvøðunum, men í øðrum kanningum hevur flokkurin kortini fingið heldur frægari úrslit.

Heldur tann seinasta kanningin, fáa teir borgarligu flokkarnir 74 stórtingsumboð, meðan tann reyð-grøna samgongan hjá Arbeiðaraflokkinum, Sosialistiska Vinstraflokkinum og Miðflokkinum fær 94 umboð.

## Fundur um fuglakrím

Djóralæknar úr øllum heiminum vóru fyrradagin á fundi í Bruxelles, har teir umrøddu vandan fyri, at fuglakrím kann spjaða seg til Evropa.

Fyrst breiddi sjúkan seg úr Eysturasia til Kasakhstan, og nú er hon eisini komin til Russlands. Tann stóri spurningurin er, um flytifuglar, sum ferðast ímillum Sibir og Evropa, kunnu bera sjúkuna við sær til okkara heimspart.

Higartil hevur fuglakrím kravt fleiri tíggjutals mannalív í Asia. Øll vórðui smittað av flogfenaði, men fleiri óttast fyri, at sjúkan fer at broyta seg, so hon eisini smittar ímillum fólk. Hendir tað, kann fuglakrímið gerast ein líka álvarssom sjúka sum spanska sjúka, ið kravdi 40 milliónir mannalív í 1918.

Í Niðurlondum hava myndugleikarnir longu givið boð um, at allur flogfenaður úr útlondum skal haldast innandura, men onnur lond fara neyvan at taka sama stig, skrivar AP.

## 50 milliónir í Onglandi

Fyri fyrstu ferð er fólkatalið í Onglandi farið upp um 50 milliónir, og nú búgva meiri enn 60 milliónir fólk í Bretlandi.

Tey seinastu bretsku fólkatølini eru frá juni í fjør, og tey vísa, at tá búðu 50,1 milliónir fólk í Onglandi. Tað merkir, at onglendingar gjørdust 240.000 fleiri í tali eftir einum ári.

Í Bretlandi t.v.s. Onglandi, Skotlandi, Wales og Norðurírlandi vaks fólkatalið eisini. Fyri einum ári síðani búðu 59,8 milliónir fólk í Bretlandi, og bretska fólkayvirlitið heldur tað vera rættiliga vist, at talið er farið upp um 60 milliónir nú. Sagt verður, at er talið ikki oman fyri tær 60 milliónirnar nú, hendir tað seinni í hesum árinum.

## Óynsktur í Finnlandi

Amerikanski sjónvarpstrúboðarin Pat Robertson skuldi verða við í einari sending hjá andaligu finsku sjónvarpsrásini TV7, men nú hevur leiðslan gjørt av at taka sendingina av skránni.

Orsøkin er, at Pat Robertson í síðstu viku mælti amerikonsku myndugleikunum til at beina fyri tí vinstrasinnaða forsetanum í Venesuela, Hugo Chavez. Chavez hevur fleiri ferðir funnist at politikkinum hjá Bush-stjórnini, og hann hevur mælt teimum latínamerikonsku londunum til at avmarka ávirkanina, sum USA altíð hevur havt á tann partin av heiminum. Pat Robertson helt, at tað er bíligari hjá USA at beina fyri venesuelska forsetanum enn at fara í kríggj við land hansara.

Orðini fingu leiðsluna í finska TV7 at taka sendingina við amerikanska trúboðaranum av skránni. Martij Ojares, stjóri, sigur við finsku tíðindastovuna, at tað er harmiligt, at ein leiðandi kristin persónur skal siga slíkt, sum Pat Robertson hevur sagt.

- Tað er ikki sambæriligt við finska mentan at tvinna politikk og kristna trúgv saman, sigur Martti Ojares, sjónvarpsstjóri.

## Amerikanarar ov feitir

Amerikanarar gerast feitari og feitari, og tað hevur ongantíð verið so ringt sum nú, sigur stovnurin Trust for American Health.

Stovnurin sigur, at fiti er ein altsamt størri trupulleiki í 48 av teimum amerikonsku statunum, og at nú eru umleið 119 milliónir amerikanarar ella 64,5 prosent av fólkatalinum ov feitir.Verður einki munagott gjørt, fer støðan at versna, og um trý ár verða 73 prosent av amerikanarunum ov feitir. Ringast stendur til í Mississippi, men støðan er lítið mætari í Alabama og West Virginia, sigur Trust for American Health.

Stovnurin sigur, at støðan er so álvarssom, at teir amerikonsku politikkararnir eiga at staðfesta, at heilsupolitikkurin er miseydnaður, og at tað er neyðugt at leggja á annan bógv.